SEGLSKIP

Fimmoghálvfems prosent av heimshandlinum verður fluttur sjóvegis, við umleið 50.000 tangaskipum, farmaskipum og bingjuskipum. Tey flestu av hesum skipum brúka dieselolju.

Verkfrøðingar arbeiða við at menna vindorku sum stuðul til skip. Teirra ætlan er at festa drekasegl í skip og brúka vindmegina til at minka um dieseloljunýtsluna og um árinið frá olju á umhvørvið.



© by skysails

Spurningur 1: SEGLSKIP

PM923Q01

Ein fyrimunur við at nýta drekasegl er, at tað flýgur í 150 metra hædd. Har uppi ferðast vindurin umleið 25% skjótari enn á skipsdekkinum.

Á leið hvussu nógv er vindferðin í drekaseglinum, tá ið vindferðin á skipsdekkinum verður máld til 24 km/t?

A 6 km/t
B 18 km/t
C 25 km/t
D 30 km/t
E 49 km/t

Spurningur 3: SEGLSKIP

PM923Q03

Umleið hvussu langt skal reipið til drekaseglið vera, um tað skal toga skipið við einum vinkli upp á 45° og vera 150 m uppi í loddrættari linju, sum víst á tekningini høgrumegin?



GG: Tekning ikki í røttum lutfalli. © by skysails

A 173 m
B 212 m
C 285 m
D 300 m

Spurningur 4: SEGLSKIP

Av tí at prísurin fyri dieselolju er so høgur, 0,42 zed fyri liturin, ætla eigararnir av skipinum *Vindalduni* at seta drekasegl á skipið hjá sær.

Metingin er, at slíkt drekasegl kann minka dieseloljunýtsluna við umleið 20% til samans.

Navn: *Vindaldan*

Slag: farmaskip

Longd: 117 metrar

Breidd: 18 metrar

Lastievni: 12 000 tons

Mesta ferð: 19 míl

Dieseloljunýtsla um árið við ongum drekasegli: umleið 3.500.000 litrar

Kostnaðurin av at gera *Vindalduna* út við drekasegli er 2.500.000 zed.

Hvussu mong ár hevði tað tikið, til kostnaðurin fyri drekaseglið var spardur innaftur við minni dieseloljunýtslu? Ger útrokningar sum stuðla tínum svari.

.....

.....

.....

.....

.....

.....

.....

Ár til samans: .....